# Nøvn

## Føðingar



*Hey eg eiti Døgg og eri 2 ár. 18/4-2011 fekk eg eina lítla systir. Hon var 54 cm og vigaði 3960 gr. Foreldur okkara eru Eyðbjørg Robertson og Róin Olsen, og vit búgva á Tvøroyri*



*29. apríl 2011 fekk Jóannes Viderø ein lítla beiggja, sum var 52 cm langur og vigaði 3700 gr. Foreldrini eru Birita Viderø og Ólavur Johannesen, Tórshavn.*

*27. apríl fingu Fía Selma Nielsen, Sandavági, og Hjalgrímur á Heygu, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3900 gr.*

*27. apríl fingu Liljan Gullaksen og Helgi Jóhannusson Bláskor, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 2670 gr.*

*28. apríl fingu Ása og Heini Krossteig, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3545 gr.*

*1. mai fingu Oddny Joensen og Suni Mortensen, Vági, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4460 gr.*

*1. mai fingu Sigvør og Eron Debes, Sørvági, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3700 gr.*

*2. mai fingu Magnhild Tausen Olsen og Klæmint Østerø, Runavík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3100 gr.*

*4. mai fingu Sólja Jóanisdóttir og Heini Hanusarson, Sandavági, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3835 gr.*

## Gullbrúðarparið

# Jóna og Jákup Lindenskov



Týsdagin 10. mai hava Jóna og Jákup Lindenskov í Havn gullbrúdleyp, tey giftust 10 mai í 1961.

Jóna er úr Fuglafirði og elst av børnunum hjá Ellefíu (1912-77) og Jóhannes Jacobsen (1910-2007), ortopediskur skómakari í Fuglafirði. Hini systkini eru: Ninnema (1938), Óli (1940), Oddvør og Lena (1942), Sigga (1945) og Osvald (1950).

Jákup er úr Havn, sonur Edvard Lindenskov (í Rættará) og Biritu, sum var í Leynum, hóast bæði foreldur hennara vóru úr Kvívík. Jákup var einasti beiggi í systkinaflokkinum. Systrarnar vóru Judith (1924-2005), Kathrina (1929ð1946), Rannvá (1934) og Sunnvá (1938). Jákup tók realprógv í Havn í 1950, og sama árið fór hann í læru hjá Tryggingarsambandinum Føroyar, sum tá helt til úti í Tinganesi, og hvørs starvsfólk kundu teljast á hondunum. Hann fór seinni til Danmarkar, har hann gekk á handilsskúla og arbeiddi í trygging.

Eftir skúlagongd í Fuglafirði var Jóna í Handlinum hjá Pidda (S. P. Petrersen). Átjan ára gomul fór hon at útbúgva seg sum sjúkrasystir. Var á sjúkrasystraháskúlanum í Stege í 1955, síðani næmingur á Dr. Alexandrines Hospital (Landssjúkrahúsið), og í 1958 fær hon psykiatrisku útbúgvingina á St. Hans Hospital, Roskilde, og í 1959 narkosoútbúgving á Gentofte Amtsygehus. Í 1960 verður hon sett í starv á Landssjúkrahúsinum, og her hevur hon síni ríku virkisár, til hon í oktober 2000 valdi at gevast.

Í 1958 stillaði Suðurstreymoyar Javnaðarfelag Jákup upp sum nummar eitt til løgtingsvalið - tá varð stillað upp í nummarrøð - og hann varð valdur. Flokkurin hevði eitt sera gott val hetta árið, og Petur Mohr Dam gjørdist á fyrra sinni løgmaður. Jákup sat á tingi til valið í 1966, tá hann fall – honum tørvaðu bert níggju atkvøður. Tá Petur Mohr Dam doyði í 1968, varð Jákup valdur í landsstýrið, og varð hann aftur valdur á ting í 1970 við hálvtfimthundrað atkvøðum. Bara Erlendur Patursson og Atli Dam fingu fleiri atkvøður. Jákup var landsstýrismaður í fýra landsstýrissamgongum. Í 1979 stillaði Javnaðarflokkurin hann upp til fólkatingið, tá veteranurin Johan Nielsen legði frá sær. Jákup varð valdur og legði landsstýrisstarvið, sum hann hevði røkt í 11 ár upp á dagin, frá sær. Hann er tann, sum hevur sitið longst sum landsstýrismaður. Jákup sat á fólkatingi í átta ár, og hann gavst sum virkin politikari í 1994, tá hann ikki stillaði uppaftur til løgtingsvalið.

Hóast Jóna gavst í sjúkrasystrayrkinum fyri ellivu árum síðani, so er hon framvegis sera virkin. Samvitskufull hevur hon røkt tað, henni varð álagt – sína Florence Natingale-uppgávu hevur Jóna røkt í størsta álvara. At hon valdi narkosuútbúgvingina gjørdi somuleiðis tað, at hon bant seg til eitt presisjónsstarv av rang. Hon fekk næmingaárini og fittan part av virkisárunum á tí gamla hospitalinum við teirri útgerð, ið tá var. Tá hon tók við á skurðdeildini var bert ein narkosusjúkrasystir, Laura Eirikstoft. Við Jónu vóru tær tvær, sum nú skiftust um vaktbyrðuna, stand-by dag sum nátt. Jóna er ein av tí gamla »besetninginum« frá tíðini, tá »yvirlæknin« - og tað var sjálvsagt Pauli Dahl – ráddi fyri borgum. Jónu sást tú kvikgongda og skundisliga fara eftir Hospitalsvegnum, hon var á síni deild áðrenn klokkan sló átta, ikki minst tey 17 árini hon var deildarleiðari.

Uttan fyri lívsstarv sítt hevði Jóna áhugamál, sum hon røkti ikki minni samvitskufult. Maðurin var politikari, børnini vóru ein dýrur lutur, at teimum skuldi einki tróta var umráðandi. Jóna hevur tikist við ymiskt í handligum sum andligum verki, lesur nógv, fæst nógv við handarbeið, íðin at binda inn bøkur og ger nógv burtur úr ættargransking, er skrivari í felagnum Ættarbandinum. At hon eisini hevur sín blómu- og plantuáhuga, er eyðsýnt í urtagarðinum í Tórfinsgøtu. Djørv er hon eisini - so djørv, at hon sum 72 ára gomul fór á telduskeið, keypti teldu – og við henni er hon sera kná. Hittir tú ikki Jónu, so kanst tú altíð sendi henni ein teldupost ella eini boða á Facebook, so fært tú í øllum førum fatur á henni.

Í politikki er Jákup kendur fyri sítt varsemi - ikki minst, tá tað snúði seg um ríkismálini. Honum dámdi lítið, tá menn fóru upp at sveima í loysingarpráti – hann virkaði fyri at tryggja lívsgrundarlagið, og ríkisveitingina sá hann sum eina neyðvendigheit til tess. Hann hevur sera drúgvar royndir, sum politikari – eitt nú var ein teirra, sum í januar í 1959 fór niður at samráðast við H. C. Hansen, forsætisráðharra um almannalógirnar, sum komu í gildi sama árið – tær lógir, sum vit í dag síggja sum eina sjálvfylgju. Øll árini sum landsstýrismaður umsat hann almannamál, og tey løgu honum øll árini næst á hjarta.

Tann fyrsta løgtingsfíggjarlógin, sum Jákup var við at samtykkja á tingi var upp á 18 milliónir. Tann síðsta, hann var við til at samtykkja – tað var í 1993, var upp á 2.500 milliónir! Hetta lýsir kanska broytingarnar í samfelag okkara – og í politikki, tey árini Jákup var virkin politikari.

Meðan Jákup var landsstýrismaður vórðu lunnar lagdir undir fleiri batar, eitt nú lógina um dagpengar við sjúku og barnsburð, eins og deildirnar á Eirargarði vórðu bygdar at hýsa teimum menningartarnaðu, sum fram til ta tíð vórðu send av landinum á stovn í Danmark. Tey kundu nú flyta heimaftur av Rødbygaard.

Í sínum borgarliga starvi á Tryggingini var Jákup við til at seta á stovn Lívstryggingina – hetta var árið fyri at hann fór í farloyvi frá Tryggingini fyri at gerast landsstýrismaður – og hann var burturi frá tryggingini næstu 16 árini.

Øll árini hevur Jákup verið virkin innan fráhaldsrørsluna gjøgnum Losjuna í Havn, har rættuliga stórt ungdómsvirksemi var í fimmti og sekstiárunum. Hann var formaður í Ungmannadeildini hjá IOGT, tá tey stovnaðu hondbóltsfelagið Kyndil í 1956. Eisini var hann var eitt skifti í sekstiárunum blaðstjóri á Sosialinum.

Jákup var í nógv ár formaður í endurbúgvingarstovninum ALV, hann hevur verið formaður í Heilbrigdinum á Velbastað síðani tað varð stovnað í 1986, var í nógv ár formaður í stýrinum fyri Blindastovnin, og var eisini formaður í nevndini fyri Eldratilhaldið í gamla Føroya Bankahúsinum í Tórsgøtu í Havn – og hann hevur sanniliga eisini gjørt ein slags come-back í politikki, tí hann er valdur í Eldraráðið í Havn báðu ferðirnar, val hevur verið, so hóast hann er farin um pensiónsaldur, so hevur hann framvegis nógv jørn í eldinum.

Jóna og Jákup eiga børnini Elin (1962), sum er gift við Høgna Rasmussen úr Gøtu, Birita (1964), sum býr í Keypmannahavn saman við Magnus Gregersen úr Gøtu og Eirikur (1966), sum er giftur við Ingun Schiller í Havn. Barnabørnini eru Fía (1979), Maria (1995), Anna (2001) og Jónas (2003) – og langommu og -abbabørnini eru Høgni (2003) og Lóa (2008). Tey sum vilja hitta gullbrúðarparið eru vælkomin niðan á Hotel Føroyar týsdagin 10. mai klokkan 17:30.